# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Bjarni Åkesson Filholm:

## Skrivar um Norsku Løvu

**Bjarni Åkesson Filholm, sum seinastu árini hevur givið út fleiri bøkur um m.a. strandfaraskipið Smiril og ferðamannaskipini við navninum Tjaldur, savnar nú tilfar um Norsku Løvu, sum forlisti á Lambavík í 1707**



*Bjarni Åkesson Filholm í Hjørring savnar nú tilfar um Norsku Løvu, sum forlisti á Lambavík í 1707*

Bjarna Åkesson Filholm, sum er hálvur føroyingur og býr í Hjørring. Í sambandi við innsavning av tilfari ynskir hann at fáa samband við fólk, sum kenna til søguna um skipið. Hann hevur sent okkum soljóðandi skriv:

*I forbindelse med researh og indsamling af materiale til en kommende bog om skibet "Norske Løve", som forliste ved Lambavík på Færøerne Nytårsaften 1707, vil jeg spørge jer, om nogen har kendskab til litteratur om skibet og forliset?*

*"Norske Løve" var et skib fra Dansk Ostindisk Kompagni, og det skulle slet ikke have været i færøsk farvand. Men en storm havde blæst det ud af kurs.*

*"Norske Løve"'s ene skibsklokke skulle i dag fungere som klokke i Tórshavn kirke, og kirkeskibet sammesteds skulle være en model af "Norske Løve."*

*Jeg har allerede fundet Bent Rasmussens børnebog "Norske Løve." og Peder Børgesens digt fra 1726:*

*"En Nye tragoediske Digt, om det Ostindiske Compagnies Skib, Den norske Løve kaldet, dets ulykkelige Søefart, saa og Undergang udi Lamhafves Vig paa Færøe."*

*samt kendskab til den musik, som William Heinesen skrev til "Norske Løve"s minde.*

*Har nogen kendskab til andet, evt. avisudklip/ artikler og fotografier af kirkeskib eller klokke, hører jeg gerne fra dem.*

*Skibet skal ikke forvekses med et dansk linie og sejlskrigsskib med samme navn.*

*Jeg hører meget gerne fra jer. Venlig hilsen Bjarni Åkesson Filholm, Bibliotekar & forfatter, Virkelyst 45, 9800 Hjørring, Danmark. e-mail: filholmlange@has.dk*

Fyri 25 árum síðan:

## Jon Hestoy – danmarksmeistari og heimsmeistari



*Jon Hestoy verður heiðraður á móttøkuni av táverandi borgarstjóranum á Tvøroyri, Sverra Midjord, og einum hópi av tvøráfólki*

**Í 1980 heiðaðu tvøráfólk Jon Hestoy av Tvøroyri, sum var vorðin danskur meistari í svimjing, 200 m butterfly, og heimsmeistari í at eta nekarakyss**

6. august 1980 var stór móttøka á Tvøroyrar kei, tá einasti føroyingur, ið hevði luttikið á nøkrum donskum landsliði, svimjarin Jon Hestoy av Tvøroyri, kom heimaftur aftaná lokna prentaraútbúgving í Århus, har hann hevði luttikið við AGF-svimjiliðnum.

Orsøkin til at tvøráfólk fagnaðu Jon Hestoy var tann, at hann hevði luttikið í donsku DM-kappingini við avbera góðum úrslitum. Hann gjørdist danskur meistari í 200 m butterfly og setti samstundis nýtt danskt met. Aftrat hesum eydnaðist tað Jón at vinna trý silvurmerki – í 1500 m fríari svimjing, 400 m medley, og 400 m butterfly.



Umframt hetta bragd luttók Jón eisini í eini heilt aðrari kapping, sum hann vann so dyggiliga. Hann gjørdist heimsmeistari í at eta nekarakyss. Gamla metið var 30 nekarakyss upp á 9 min og 11 sek, meðan Jon bert brúkti 4 min og 46 sek og annars helt fram, til hann hevði etið 50 nekarakyss upp á 10 minuttir.

*Myndaárbókin – árið ið fór 1980*

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Elsa S. Mittelstein**

andaðist og varð jarðað.

Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Lágargarð.

Takk til prest, Jóannis Fonsdal, fyri góða og troystarríka talu. Takk til sangarar, berarar og kirkjutænarar. Tøkk til heimarøktina og øllum tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Takk fyri alt.

*Vegna familjuna,*
**Jørmund, Sólgerð, Edna og Steinfinnur**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum gleddu meg á mínum 85 ára føðingardegi, takki eg hjartaliga fyri blómur og uppringingar.
Ein serlig tøkk til tykkum, sum komu inn á gólvið.

**Rigmor Heinesen, Miðvági**

### 90 ára føðingardagar

Hósdagin 11. august verður Anna Hansen, Norðragøta, 90 ár. Dagurin verður hildin heima hjá ommudótturini Maluni.

Hósdagin 11. august fyllir Ella Arge, Tórshavn, 90 ár. Føðingardagin verður Ella burturstødd.

### 70 ára føðingardagur

Í dag fyllir Poul Johannes Egilsnes, Vestmanna, 70 ár. Hann er burturstaddur.